




# Tað, sum vit eru felags um



Mynd: Sunva Ey. Lassen

**HEILSAN**

*Jan Müller, blaðstjóri*

Ólavsøkan, okkara tjóðhátíð, er meira enn nakað annað tað, sum vit føroyingar eru felags um. Vit eru jú sum flest onnur fólk ósamd um stórar samfelagsspurningar – óneyðugt er at nevna dømi. Hetta er einki løgið, men heldur er tað tvørturímóti ein natúrligur partur av hesum at vera eitt fólkaræði. Í fólkaræðisligum samfelag er tað legalt at vera ósamdur og at hava ymsar áskoðanir. Í fólkaræðisligum samfelag er tað bæði loyvt og gagnligt at vera ósamdur við stjórn og valdsbygnaðin. Virðing fyri teimum, ið ikki meina tað sama, sum ein sjálvur meinar, er eitt grundleggjandi eyðkenni fyri sunt og vælvirkandi fólkaræði. Eitt annað eyðkenni er rætturin til orðaskifti um allar hugsandi spurningar í samfelagnum. Hesi viðurskifti vekja mangan undran hjá fólki, sum búgva í einaræðislondum, har tað ikki verður tolt, at borgarin er ósamdur við stjórnarvaldið.

Men júst hesi eyðkenni við fólkaræðinum hava sum fortreyt, at tað eru nøkur mentanarlig og politisk kjarnuøki ella virði, sum tann demokratiska tjóðin er felags um. Tað eiga at vera nøkur viðurskifti, sum savna og sum tryggja samanhangsmegi og samhaldsfesti í tjóðini. Vit hugsa her um eitt nú mál, søgu og mentan og felags virði sum heild, ella við øðrum orðum alt tað, ið eitt nú vit føroyingar eru felags um. Tað er í hesum sambandi, at ólavsøkan hevur sín ómetaliga stóra týdning. Sum tjóðhátíð okkara er hendan hátíð meira enn nakað annað tað, sum savnar okkum føroyingar, og sum fær okkum øll at kenna okkum sum eina tjóð við felags minnum og felags mentan.

Tann týdningur, ið ólavsøkan hevur fyri føroyskan samleika, kann ikki yvirmetast. Á ólavsøku verða vit mint á, at vit eiga eitt av heimsins elstu løggávutingum. Føroya løgting er sum stovnur eldri enn øll løggávuting í Norðurlondum, og tað er eldri enn flestu ting í Europa, ja løgtingið er eldri enn sjálvt "the mother of parliaments", bretska parlamentið.

Fólkaræði er sostatt ein íbúgvandi partur av okkara mentan og søgu – lat so vera, at tað til tíðir ikki hevur lokið øll nútímans krøv til demokratiskar skipanir og kanska enn haltar eitt sindur viðhvørt. Men tað er so har, og hevur altíð verið har. Hesum eiga vit øll at vera stolt av.

Tað eru tí allar góðar orsøkir hjá okkum føroyingum at vera góð við ólavsøkuna, og vit eiga øll at gera okkara besta til, at tjóðhátíðin verður hildin við størst møguligum sóma. Hetta merkir ikki, at vit ikki skulu stuttleika okkum og halda okkum at gaman. Men vit eiga ongantíð í øllum ólavsøkumeldrinum at gloyma, hvat henda hátíð stendur fyri. Hon er okkara tjóðhátíð, hvørs røtur røkka heilt aftur til landnámstíðina. Landnámsmenn hildu ting og keypstevnu í Tórshavn á hásumri. Føroyingar vóru heidnir og dyrkaðu Óðin og Tór, og varð tingstaður teirra nevndur eftir Tóragudi. Tá okkara forfedrar tóku við kristnari trúgv, og norski kongurin Ólavur Haraldsson gjørdist teirra best umtókta halgimenni, ja, so hóskaði tað væl at gera deyðadag hansara til dagin, tá tingið varð sett og annars at leggja alt tað virksemi til gaman og álvara, sum hevði verið knýtt at heidnu summarstevnuni til hendan dag, tann 29. juli.

Ólavsøkan er sostatt nær knýtt at okkara politisku søgu, mentan, átrúnaði og samleika. Ólavsøkan í ár fær heilt serstakan súmbolskan týdning við tað, at ólavsøkudag verður Fólkakirkjan føroysk burturav. Við hesi gleðiligu hending fær tjóðhátíðin enn størri ímyndaligan týdning fyri føroyskan samleika.

Sosialurin og Miðlahúsið ynskja øllum føroyingum góða ólavsøku!